FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

4. februar 2022
Mál: 22/01859-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-118/2021

Svar til fyrispurning 52-118/2022 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um alment innlit í tilmælini hjá umsitingini um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

Ætlar landsstýrismaðurin at lata alment innlit ella partsinnlit í tilmælini frá umsitingini um at játta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir – herundir til ítøkiligt skipakeyp og ískoytiskvotur í 2020 og 2021 – og skrivliga og skjalfesta grundarlagið hjá landsstýrismanninum fyri at vraka tilmælini og velja onnur ístaðin?

Svar:

Burtursæð frá ávísum upplýsingum eru allar umbønir um innlit játtaðar í umsóknir og avgerðir um tillutan av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, og harumframt er innlit játtað í kærur/umbønir um uppafturtøku og avgerðir hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi metingum í innanhýsis arbeiðsskjølum, undir hesum metingar í tilmælinum frá umsitingini um at játta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, er innlit sýtt vísandi til fyrilitið til, at umsitingin skal kunna arbeiða órógvað í sambandi við viðgerðina av málum.

Hetta er í samsvari við fyrisitingarlógina og lógina um alment innlit, og Løgtingsins Umboðsmaður hevur í klagumáli um avgerð Ráðsins at sýta innlit onga viðmerking havt til avgerð Fiskimálaráðsins um at sýta innlit í innanhýsis metingar í hesum skjølum.

Leggjast skal afturat, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur í sama klagumáli viðmerkt, at ein myndugleiki eigur at lata innlit í møguligar upplýsingar - í innanhýsis arbeiðsskjølum - um veruligar umstøður av stórum týdningi fyri málið sambært § 11 i lógini um alment innlit. Í hesum ítøkiliga føri metir Umboðsmaðurin tó, at tilmælið frá umsitingini í Fiskimálaráðnum í síni heild er undantikið almennum innliti í løtuni, eisini viðvíkjandi skylduni í § 11. Grundarlagið fyri hesum er, at áheitan er latin Løgtinginum um at seta kanningarstjóra eftir § 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini at kanna fyrisitingarligar avgerðir um

ítøkiligar útlutingar av fiskirættindum frá 2018 til og við 2021. Innlit kann tí sýtast í tilmælini í síni heild vísandi til § 13, stk. 1, nr. 6 í lógini um alment innlit.

Landsstýrismaðurin fer tí ikki at lata innlit í tilmælini frá umsitingini at játta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Árni Skaale
landsstýrismaður